**Nr. 44/2015**

**Kári P. Højgaard**
**løgtingsmaður**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um almennar alment starvsfólk kring landið, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Kristinu Háfoss (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Hvussu nógv alment lønt starvsfólk arbeiða kring landið, uppgjørt eftir sama myndli, í hvørjari av sýslunum?
2. Hvussu stór er almenna lønarútgjaldingin, býtt eftir sama myndli, í hvørjari sýslu sær?

**Viðmerkingar**
Um vit vilja varðveita okkara oyggjasamfelag, so fólk eisini í framtíðini velja sær bústað uttan fyri meginøki, krevst, at almenn arbeiðspláss í størri mun verða løgd kring landið. Tær gomlu sýslurnar kundu verið eitt gott boð, har politiska skipanin valdi at styrkja økismenningina við almennum arbeiðsplássum.

Vællønt almenn arbeiðspláss krevja ofta góða útbúgving og servitan. Sjálvsagt verða tey flestu av hesum størvum løgd í høvuðsstaðnum á sama hátt sum í okkara grannalondum. Hinvegin er alneyðugt at hugsa um allar Føroyar. Tað kann politiska skipanin gera við at skapa/leggja førleikakrevjandi almenn arbeiðspláss kring landið.

Býtið av teimum seks sýslunum kundi verið eitt gott boð at greina, hvussu býtislutfallið av almennum arbeiðsplássum er í dag, og um nøkur oyggj er afturúrsigld í mun til onnur øki. Tí fer ein uppgerð av virkseminum, knýtt at húsaognunum, almenna tørvinum á leigubygningum og útgjald av almennum lønum, býtt út á sýslurnar, at greina veruleikan.

Um tað ikki ber til at greina svarið í sýslum, kundu kommunalu samstarvsøkini verið nýtt í staðin.

**Á Løgtingi, 15. apríl 2016**

Kári P. Højgaard